

*Varð Jákup Mørkøre uppsagdur av órøttum má hann mist fáa uppreisn, sigur formaðurin í Verkfrøðingafelagnum*

# Minsta krav er at Jákup Mørkøre fær uppreisn

*– Er Jákup Mørkøre skeivt viðfarin er tað minsta krav, at hann fær uppreisn, sigur Suni Joensen, formaður í Verkfrøðingarfelag Føroya*

Áki Bertholdsen

–Vit arbeiða enn við málinum. Men vit vilja heldur hava eina semju enn eina rættarsak.

Enn er tað ikki greitt, um uppsøgnin av Jákup Mørkøre, fyrrverandi leiðara á Landssjúkrahúsinum, endar í rættinum, ella ikki.

Fakfelag hansara, Verkfrøðingafelag Føroya, arbeiðir framvegis við málinum.

Men formaðurin í felagnum, Suni Joensen sigur, at eitt rættarmál er avgjørt síðsti útvegur.

– Vit vilja heldur royna at loysa málið við eini semju við Landsstýrið, so í fyrstu syftu verður ikki stevnt, sigur hann.

Men hann sigur, at fyrivarni fyri at royna málið í rættinum stendur framvegis við, skuldi tað miseydnast at funnið eina semju.

– Men vit halda, at tað er frægari loysn at royna at finna eina semju í málinum.

– Men miseydnast tað, stendur hin møguleikin framvegis opin.

Suni Joensen sigur, at verkfrøðingafelagið hevur gjørt av at arbeiða víðari við málinum.

Felagið hevur eina kærufreist uppá ein mánað, frá tí at uppsagnin er latin Jákupi Mørkøre og tann tíðin er ikki farin fyrrenn um tríggjar vikur.

Nú verður alt tilfar savnað saman, sum felagið hevur brúk fyri, og so fer Verkfrøðingafelagið at biðja um fund við Almanna- og heilsumálastýrið.

## Má fáa uppreisn

Suni Joensen sigur, at minstakravið er, at Jákup Mørkøre fær uppreisn í hesum máli.

– Er skeivt farið fram í hesum máli, má hann í minsta lagi fáa uppreisn, sigur formaðurin í Verkfrøðingafelagnum.

Men hann leggur afturat, at, at verkfrøðingafelagið hevði ikki arbeitt víðari við málinum, um nevndin ikki metti, at tað varð skeivt farið fram.

Formaðurin í Verkfrøðingafelagnum sigur, at felagið tekur hetta málið í størsta álvara.

– Tað er blivið eitt gjøgnumgangandi fyribrigdi í almennu umsitingini, at leiðarar verða sagdir úr starvi.

– Vit hava fleiri dømi um leiðarar, sum eru sagdir upp, uttan at grundgevingin altíð hevur verið líka góð.

Formaðurin í Verkfrøðingafelagnum sigur, at hetta tekur felagið í størsta álvara og tað er helst galdandi fyri onnur feløg við, tí tað eru ikki bara limir í Verkfrøðingafelagnum, sum verða uppsagdir.

Hann sigur, at í longdini kann hetta fáa álvarsligar avleiðingar fyri almennu umsitingina, tí so leingi viðurskiftini eru so ótrygg, fer tað uttan iva at fáa fólk at aftra seg við at søkja almenn leiðarastørv fyrrenn leiðararnir fáa tryggari kor.

Hann heldur eisini, at almenna umsitingin skuldi gingið undan sum góðar fyrimyndir á hesum øki.

–Men tað sær tvørturímóti út sum um at myndugleikarnir mugu halda, at tað eru ógvuliga fáir føroyingar, sum kunnu brúkast í leiðandi størvum, leggur Suni Joensen turrisliga afturat.








# Eysturskúlin skal gerast roykfríur

*Eysturskúlin í Havn er farin í hernað. Virkast skal soleiðis fyri, at skúlin gerst roykfríur*

Jákup Bogi Joensen

Nógv fólk høvdu leitað sær niðan í Eysturskúlan í Havn týskvøldið, har skipað varð fyri stórum upplýsandi fundi um royking. Fundurin var fyrst og fremst ætlaður foreldrum at næmingum í Eysturskúlanum.

Eysturskúlin hevur sum hin fyrsti skúlin í landinum tikið stig til at koma roykingini til lívs. Hetta skal gerast við miðvísum upplýsandi arbeiði.

Átta fólk sum øll arbeiða innan heilsuøki vóru boðin við á fundin.

Heðin Thomsen yvirlækni á landssjúkrahúsinum, Hjalti Gunnarstein apotekari, Lynn Reveal avvenjari og Sanna Hansen ljósmóður, løgdu fram og greiddu okkum frá um vandarnar, ið standast av tubbakki.

Heðin Thomsen yvirlækni vísti millum annað á, at tað í Danmark doyggja umleið 13.000 fólk árliga av royking. So svørt síggja tølini tó ikki út her hjá okkum, men tey eru tó rættiliga skakandi. Okkurt um 86 ella fimti hvør føroyingur doyr av royking.

Eisini landsstýriskvinnan í almanna og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, var við á fundinum.

- Royking er ein vaksandi trupulleiki í skúlunum runt um landi. Tí eri eg sera fegin um, at Eysturskúlin tekur stigið fult út, og setur sær sum mál at gerast roykfríur, segði Helena Dam á Neystabø millum annað. Tølini vísa heilt greitt, at tey allar flestu byrja at roykja um 14 ára aldur.

Tí hevur Eysturskúlin gjørt av at venda sær serliga til júst hendan aldursbólkin, tá talan er um upplýsandi arbeiði.

Ein av stigtakarunum til fundin týskvøldið var Manne Persson, ið eisini er lærari á Eysturskúlanum.

- Royking hevur verið ein stórur trupulleiki her á skúlanum í nógv ár. Vit hava roynt ymiskt fyri at koma roykingini til lívs, men ongantíð er tað eydnast. Einaferð var fullkomið bann sett fyri at roykja í Eyturskúlanum, men hetta datt niður fyri aftur. Nú royna vit so aftur, og vóna at vit upp á henda hátt kunnu forða fyri at ung fólk byrja at roykja, segði Manne Persson, í stuttari viðmerking við Sosialin.

Á fundinum týskvøldið kom annars fram, at Eysturskúlin eisini fer at gera nakað fyri tey sum longu eru byrjað at roykja. Skúlin fer nevnliga at bjóða næmingum, sum vilja leggja av at roykja, serkøna og ókeypis hjálp.

Uttan iva ein sera góð hugsan sum aðrir skúlar áttu at tikið til sín.

Í hvussu so er vísti Helena Dam á Neystabø landsstýriskvinna, málinum stóran áhuga og segði, at hon vil gera sítt til, at arbeiði móti royking verður gjørt til fulnar.



*Páll Horn, umboð fyri næmingaráðið, Eyðdis Baldvinson, skúlastjóri, Manni Persson og Jógvan Martin Mørk, lærara*

# Broytingar innan almannaøkið

*Viðmerkingar til avleiðingar í sambandi við broytingar innan almannaøkið í Starvsmannasáttmála*

Í § 2 stk. 1. stendur:

> *„Tá ið avgerandi broytingar verða gjørdar í arbeiðsgongdini ella umsitingini á einum stovni, skal starvsfólkið hava boð um hetta í góðari tíð fyri at fáa høvi til at vera við í tilrættaleggingini. Krevja tílík tiltøk eftirútbúgving, skulu starvsfólkini hava høvi til at fáa neyðuga eftirútbúgving, so tey kunnu røkja hesi arbeiði“*

Sum dømi uppá avgerðandi broytingar kann nevnast at 1. januar ár 2000 kom nýggj pensiónslóg í gildi.

Sosialráðgevarafelagið ásannar, at ein nýggj lóg vil viðføra ymiskar trupuleikar. Í sambandi við nýggju pensiónslógina, hava sosialráðgevarar á pensjónsdeildini merkt hetta sera týðuliga og er hetta serliga orsakað av, at lógin var ov illa umhugsað og kanska eisini tí at ongin av teimum, sum arbeiða, við hesum dagliga, vórðu hoyrd.

Sosialráðgevarafelagið harmast um, at tað løggevandi valdið ikki hevur nøktandi innlit í avleiðingarnar, tá avgerðandi lógarbroytingar verða framdar. Tann 3. Januar ár 2000 stóðu sosialráðgevarnir á Almannastovuni við ábyrgdini av fylgjunum av broytingunum, sum Almanna- og Heilsumálastýrið tók ein av síðstu døgunum í Desember. Soleiðis varð ábyrgdin flutt frá Almanna- og Heilsumannastýrinum yvir á Almannastovuna.

Talið av pensjónistum í Føroyum er í dag: fólkapenjónistar 5577, avlamispenjónistar 2089 íalt 7666 pensjónistar.

Á pensjónsdeildini eru 11 starvsfólk. Harav eru 3 sosialráðgevarar, umframt deildarleiðaran sum eisini er sosialráðgevi. Síðan nýggja pensjóslógin varð sett í verk, hevur verið telefonstormur á Almannastovuni, og hevur starvsfólkið á pensjónsdeildini ikki gjørt annað seinasta mánaðin enn at greiða fólki frá pensiónsútgjaldingum og hevur ongin tíð verið til annað arbeiði.

Tað at fleiri broytingar eru gjørdar aftaná at lógin varð sett í gildi hevur viðført, at sosialráðgevarnir á pensjónsdeildini, sum umsita lógina hava kent seg ørkymlaðar og máttleysar, og vóru boðini til viðskiftafólkini tí ymisk frá degi til dags. Hetta viðførir so aftur, at viðskiftafólkini missa álitið á okkum sum sosialráðgevarar.

At Almanna- og Heilsumálastýrið setir eina slíka lóg í verk, uttan at fylgja mannagongdini sambært § 2 stk. 1 í Starvsmannalógini, fær avleiðingar. Tað setir stór krøv til sosialráðgevarnar, tá grundarlagið (lógir og siðvenja) í dagliga arbeiði teirra broytist avgerandi og sum í hesum føri talan er um eina nýggja lóg, ið vísir seg ikki at vera nøktandi. Avleiðingarnar eru at sosialráðgevararnir vera ovbyrjaðir og viðførir hetta, at tænastustøðið lækkar munandi og tí eisini okkara umdømi sum fakbólkur.

Áðrenn avgerðandi broytingar viðvíkjandi arbeiðsgongd, umsiting ella løggávu fara fram, eiga viðkomandi fakbólkar at verða hoyrdir. Sosialráðgevarafelagið metir, at vit við okkara innliti og vitan innan almannaøkið, kunnu verða ein stuðul tá ið fyrireikingar og broytingar skulu fremjast á almannaøkinum.

**Vinarliga**
**Sosialráðgevarafelag Føroya**

